FYLGISKJAL 3

**Sólgerð Hjørleifsdóttir**

---

**Fra:** dat@dat.fo
**Sendt:** 16. oktober 2019 14:16
**Til:** Poula Lervig
**Emne:** SV: Lógaruppskot til hoyringar

Góðan dag Poula.

Dátueftirlitið hevur viðmerkingar til § 3a í lógaruppskotinum, sum snúgva seg um skylduna hjá føroyska myndugleikanum til at: "veita nøktandi upplýsingar til viðgerð av umsókn um fyritíðarpensión í landinum, sum viðkomandi flytur til"(endurgivið).

Um talan er um persónupplýsingar, soleiðis sum hesar eru allýstar í persónupplýsingalógini, t.e. ll. nr. 73 frá 8. mai 2001, § 2, nr. 1 og 9, so eru ásetingar um flutning til útlond í lógarinnar § 16, stykki 2 og í k. nr. 31 frá 21. mars 2019 um flutning av persónupplýsingum til útlond.

Meðan Danmark er at meta sum eitt trygt útland at flyta persónupplýsingar til, sí skjal 1 í umrøddu kunngerð, er Grønland ikki at meta sum eitt trygt útland(er ikki á listanum).

Hetta merkir, at bæði vanligar og viðkvæmar persónupplýsingar kunnu flytast til Danmarkar uttan loyvi frá Dátueftirlitinum. Tó skal flutningurin fráboðast eftirlitinum.

Tá um Grønland ræður, krevst loyvi frá Dátueftirlitinum, víst verður til § 17 í persónupplýsingalógini.

Tá um elektroniskan flutning út um egið net ræður, skal flutningurin tryggjast (bronglast el. líkn.) sambært trygdarkunngerðini, t.e. k. nr. 27 frá 28. febr. 2003, § 11, 3. stykki, um talan er um **trúnaðarupplýsingar, t.e.** Trúnaðarupplýsingar eru ikki allýstar í persónupplýsingalógini, men eru at skilja soleiðis, sum hugtakið er lýst í fyrisitingarrættinum, t.e. upplýsingar sum sambært vanligu fatanini í samfelagnum eiga at verða vardar fyri, at tær koma á skeivar hendur/gerast alment kendar.
Sum tað meira í minna, er ásetingin her omanfyri sjálvsagt galdandi fyri viðkvæmar persónupplýsingar.

Dømi er tá fleiri vanligar persónupplýsingar verða sendar saman, td. kontunummar saman við føðingardegi.
Tá um p-talið ræður er serlig áseting í persónupplýsingalógini § 11, so tá talan er um p-tal skal dátuábyrgdarin geva hesum ans.

Umframt skal Dátueftirlitið viðmerkja, at tað í viðmerkingunum til lógaruppskotið umframt eigur at vera nágreinað, hvørjar persónupplýsingar eru neyðugar at viðgera til tess at røkka endamálinum við viðgerðini, soleiðis at ikki skeivar/óneyðugar persónupplýsingar verða viðgjørdar, sí lógarinnar § 8, og tá serliga ásetingina um dátuminimering í § 8, 1. stykki nr. 3. Mælt verður tí skil til, at hugtakið: "nøktandi upplýsingar"(endurgivið) verður nágreinað.

Vinarliga

Eyðhild Skaalum

stjóri

Dátueftirlitið

Postboks 300
FO-110 Tórshavn

Tel. +298 309100
Far. +298 599100
Fax. +298 309101
eydhild@dat.fo
www.dat.fo

---

**Fra:** Poula Lervig <poulal@amr.fo>
**Sendt:** hósdagur, 10. oktober 2019 09:59
**Til:** dat@dat.fo
**Emne:** Lógaruppskot til hoyringar

Góðan dagin,

Hjálagt verður sent **uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a. (lættari atgongd hjá fyritíðarpensjónistum at flyta millum Føroyar, Danmark og Grønland)** tykkum til hoyringar.

Eisini er hjálagdur javntekstur, ið samanber galdandi orðingar í lógini við broyttu orðingarnar í lógaruppskotinum.

Møguligar viðmerkingar til uppskotini skulu verða Almannamálaráðnum í hendi skjótast gjørligt og í seinasta lagi mánadagin 21. oktober 2019. Viðmerkingarnar skulu sendast til amr@amr.fo

Uppskotið er einans sent við telduposti.

Vinarliga

Poula Árnadóttir Lervig
fulltrúi